## Nýggjan formann

Á ársaðalfundi í gjár fekk Felagið Línuskip nýggjan formann. Rólant Poulsen, sum var formaður, og sum hevur sitið í nevnd felagsins seinastu 13 árini, ynskti at sleppa frá. Í hansara stað valdi aðalfundurin Jóhannes M. Olsen. Aðalfundurin hjá línuskipunum staðfesti, at daghýran hjá manningunum var 1.400 krónur í meðal í fjør, og at tað var minni enn hjá flestu skipabólkunum. Felagið ætlar tí at útvega línuskipunum fleiri møguleikar.

## Útbyggja skúla

Ætlanin at byggja Tekniska Skúla í Klaksvík út er nú sett í verk. Gjáramorgunin byrjaði útgrevsturin. Tað er byggifyritøkan Norðhús, sum hevur fingið arbeiðið, sum ætlandi verður liðugt um eitt ár. Ein nýggjur bygningur skal byggjast norðan fyri verandi skúlabygning. Nýggi bygningurin verður umleið 1.000 fermetrar í tveimum hæddum. Sambært Norðlýsinum ger útbyggingin, at tennisvøllurin hjá klaksvíkingum hvørvur.

# Sjólívið er well



**Seinnapartin í gjár mynstraði Diana Poulsen úr Klaksvík umborð á Atlantic Navigator.**
**- Allar tær, sum eg havi kamar saman við eru fittar, so tað er ordiliga gott!, sigur 17 ára sjókvinnan við Sosialin**

SJÓKVINNA
*Orð & myndir: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Tað er ein øgilig rokan her í góðshavnini í Ánunum, nú klokkan er farin at nærkast middegi.

Tað er mikudagur og reiðarí'ið hevur í lýsing boðað frá, at manningin skal mynstra umborð kl. 12.

Bilar í hópatali standa á havnarlagnum. Foreldur koma við barni ella børnum sínum, og onkur ung kvinna má siga farvæl við ein ungan sjómann.

Her síggjast eisini fleiri ungir mans standa við heldur sorgtungum eygum, nú unnustan skal umborð á henda stóra framleiðslutrolaran.

Millum tey í júst hesi støðuni, er 17 ára gamla Diana Poulsen úr Klaksvík.

Hon er bæði von við sjómanslívið og sjómanstos heimanífrá. Pápin eigur útróðrarbátin "Fiskaklett", og sjálv hevur hon – hóast sín unga aldur – longu verið fleiri túrar til skips.

- Henda túrin er beiggi mín, Grímur eisini við. So tað er bara fínt, sigur hon.

### Forskotsseðil

Nú klokkan er farin beint av tólv, byrja teir ungu sjógarparnir at savnast kring eitt borð inni í messuni.

Við borðið situr ein álvarsamur maður og býtir út eitt ark til hvønn einstakan av manningini. "Forskotsseðil", stendur á tí.

Tey seta seg beinanvegin við borðini at fylla hetta arkið út. Tá tað er gjørt, kann ein gera tað ein vil, tí lagt verður neyvan frá landi beinanvegin.

Kokkurin hevur longu verið til arbeiðis, og hagani ber til at snodda seg fram til, at hansara partur liggur ikki eftir: Døgurðin í dag er longu klárur.

Í roynd og veru eru fleiri av manningini longu setstir við borðini at skaffa. Tað tykist tó sum fleiri av teimum ungu heldur vilja sleppa at installera seg í kømrum sínum, áðrenn tey eta fyrstu máltíðina umborð.

Alt hetta tekur sína tíð, men tá klokkan er farin beint av tvey, sæst Navigator stevna út av Klaksvíkini og leggja til brots á sín fyrsta túr í ár.

Sum skilst er ætlanin í fyrsta lagi at royna í føroyskum sjógvi, og møguliga í írskum sjógvi seinni.

### Dámar væl

Hetta er sum nevnt ikki fyrsti túrurin hjá ungu klaksvíksgentuni Dianu. Hon var eisini við seinasta túrin í farna árinum, og hevur eisini verið til skips við undanfarna trolaranum hjá reiðarí'inum.

- Mær dámar bara væl at vera á sjónum. Tað er well, sigur hon.

Sjólívið hevur altíð havt nógv at siga í umhvørvinum hjá Dianu. Sum longu nevnt eigur pápi hennara ein útróðrarbát í Klaksvík. Hetta hevur sjálvandi havt ávirkan á heimalívið.

- Tá hann kom aftur av túri, plagdi eg at spyrja hann, hvat teir høvdu fingið. So hetta er bara natúrligt fyri meg, sigur Diana.

Tað eru kortini mong ymisk viðurskifti sum gera, at Dianu dámar sjólívið so væl.

- Eg hevði hug at royna okkurt nýtt, og eg haldi eisini, at sjólívið er sera spennandi.

> **"Eg haldi, at tað er í fínasta lagi at gentur eisini fara til skips. Hví skuldu tær ikki tað?!**

- Og so fær ein eisini rættiliga góða løn, slær hon fast.

Frammanundan at Diana fór til skips, hevði hon m.a. arbeitt á landi í klædnahandli og í kiosk í Klaksvík.

### Langur túrur

Navigator kom aftur av seinasta túrinum beint fyri nýggjár. Hetta var eisini ein rættiliga góður túrur til fiskiskap.

Teir – ella rættari sagt: tey – høvdu omanfyri 2200 tons henda túrin av surimi og mjøli, so her var eingin orsøk at klaga um sjálvan fiskiskapin.

Fyri Dianu var tað kortini eitt, sum hon er eitt sindur hørm um – longdina á túrinum, sum vardi í umleið seks vikur:

- Eg haldi, at túrurin var góður, men hann var kanska í longra langi. Men hvat – vit fingu so fulla last!, sigur hon.

### Frídagar í landi

Tann omanfyri 100 fólk stóra manningin náddi júst heim at halda nýggjár, áðrenn lagt varð frá landi um tvey-tíðina í gjár.



*Diana kennir fleiri av manningini, millum annað eina av vinkonum hennara úr Klaksvík. Bróðir hennara, Grímur er eisini við*